## Grønlendingar skylda

Grønlendingar hava brúkt ov nógvar pengar upp á flatskíggjasjónvørp, dýrar fartelefonir og tónleikaútgerð, og úrslitið er, at alt fleiri enda í yvirlitinum hjá RKI, sum skrásetir fólk, sum ikki megna at rinda sína skuld. Stjórin í skrásetingini sigur við kringvarpið í Nuuk, at skuldin er vaksin sera nógv tey bæði seinastu árini. Í januar var talið komið upp í knappar 36 milliónir krónur, og tað er 35 prosent meiri enn í sama mánaði í 2008, sigur hann. Í Grønlandsbankanum verður sagt frá fólki í 20'unum, sum hava lænt upp ímóti 400.000 krónum frá ymsum lánsveitarum, sum tey ikki megna at gjalda.

## Eingin flúgving

Í Bretlandi hava myndugleikarnir givið landsins flogfeløgum boð um at steðga allari flúgving millum Bretland og Jemen. Orsøkin er, at tann jemenska deildin hjá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda hevur hótt við tiltøkum, og at nigeriski maðurin, sum royndi at spreingja eitt amerikanskt flogfar á jólum, kom úr Jemen. Umframt at banna bretskum flogfeløgum at flúgva til Jemen hevur bretska stjórnin bannað tí almenna jemenska flogfelagnum at flúgva millum londini. Samstundis hava teir bretsku myndugleikarnir hert eftirlitið á altjóða flogvallunum munandi.

# Violinin læ meg at lær

**- Eg spæli violin, tí tað er ordiliga skeg, sigur Silas Gudmund Hannesarson, sum gongur í 1. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla. Hann er ein av hepnu næmingunum í verkætlanini "Litir í leiki"**

UNDIRVÍSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Havn:** Silas situr so hugagóður og spælir violin saman við fýra øðrum.

Tey fimm sita fult konsentrerað og hava bert eitt í hyggju: At spæla júst tað, sum lærari teirra sigur.

Nótarnir eru skrivaðir sum vanligir nótar, tó við tveimum undantøkum: Har eru ongar nótalinjur, og ístaðin fyri svartar nótar spæla tey fleirlittar nótar.

Líkt er til at hetta dámar teimum sera væl, tí tað merkist, at her er farið væl um, og úrslitið av undirvísingini verður eisini borðreitt fyri tíðindatænastuni.

Hetta er partur av einum nýggjum tilboði til næmingarnir í fyrsta flokki í Kommunuskúlanum. Hesir hava havt – og fáa aftur komandi skúlaár - møguleika at luttaka í eini verkætlan, sum á enskum kallast "Colour-Strings-verkætlanin". Her stendur teimum m.a. í boði at fáa individuella undirvísing í ávísum ljóðførum.

Sjálvur heldur Silas, at hetta er ein góður máti at ganga í skúla uppá:

- Tá man spælir, skal man tonkja ræðuliga nógv við høvdinum, sigur ungi og ídni tónleikarin.

### Lærir betri

Tað var í farna skúlaári at Kommunuskúlin fekk møguleika fyri at menna børnini eftir hesum leistinum.

Her er bæði undirvísing fyri tann einstaka í guitara, cello, violin og tvørfloytu, tey spæla í bolki saman eins og tey verða undirvíst í hoyrilæru.

Eitt stórt arbeiði er harafturat gjørt til tess at førleikamenna lærararnar til verkætlanina, sum higartil



*Børnini hugna sær saman í serstøku tónleikaundirvísingini í Tórshavnar Kommunuskúla. Við klaverið situr Hanus Joensen, skúlastjóri*



*Emma Helena Yan Hansen spælir cello. Hon venur fram ímóti eini konsert í Norðurlandahúsinum*

# - Ein cello ljóðar flott

Ein av teimum ídnu cellospælarunum er Emma Helena Yan Hansen.

Hon er eisini sera fegin um hetta tilboðið í Kommunuskúlanum.

- Mær dámar væl cello, kemur tað stillisliga frá henni. – Eg haldi, at ein cello ljóðar flott!

Sambært Emmu Helenu er ikki so stórur munur á eini cello og á eini violin. Ein munur er tó tann, at cello'in stendur á einum pinni á gólvinum. Og tá hon ger tað, ja, so er klárt at spæla.

- Eg spæli cello, tí eg skal gera eina konsert í Norðurlandahúsinum einaferð, - eg veit ikki ordiliga nær, sigur hon.

Men tað er ikki bert fyri konsertina skuld, at Emma Helena spælir cello. Tað hjálpir henni eisini uppá aðrar mátar.

- Tað hjálpir mær, soleiðis at eg treni nógv. So kann eg venja nógv fram til konsertina, slær hon fast.

# Litir í leiki

Verkætlanin Litir í Leiki, sum byrjaði í august í fjør í Kommunuskúlanum, hevur higartil gingið væl.

Stór íløga er gjørd til tess at førleikamenna starvsfólkið í verkætlanini, við m.a. at senda hesi til útbúgvingar og skeið í Danmark, Ungarn, Eysturríki, London og Finlandi.

Hesar útreiðslur vóru fyritreytir fyri royndarverkætlanini og eru sjálvandi givnar ókeypis í forhond, um skúlin fær loyvi at halda fram við hesum námsfrøðiliga royndartiltaki.

Tað er eisini sera týdningarmikið fyri haldvirðið í kanningini, at vit fáa ein